**Endarøða hjá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, til handan av mentanarvirðislønum landsins í Varpinum í Klaksvík, 23. oktober 2024**

Hjartans tøkk fyri í kvøld. Tað hevur verið mær ein sannur heiður, sum landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum, at handa virðislønir landsins fyri 2024.

Hjartaliga tillukku tit trý, Hanni Bjartalíð, Randi Ward og Beinir Bergsson við virðislønunum. Hjartans tøkk fyri tykkara vala íkast til føroyska mentan og list.

Framførslurnar hjá Jóhannesi Andreasen, Supervisjón við Lasse Thorning Jæger, Guðrið Hansdóttir við bólki og Klaksvíkar Hornorkestri hava sett sín serliga dám á kvøldið. Hjartans tøkk øll tit, ið hava gjørt okkum kvøldið so serstakt.

Takk, Kringvarp Føroya og øll tit, ið hava verið verið til tiltakið.

Takk fyri blíðskapin Karl Johansen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu og Varpið fyri at tit hava hýst tiltakinum í kvøld. Eg fari at nýta høvi at ynskja klaksvíkingum, norðoyingum og okkum øllum hjartaliga tillukku og blíðan byr við Varpinum.

*Her fer listin og mentanin at trívast – bæði tann staðbundna og tann, ið kemur á vitjan.*

Eg havi hug at enda kvøldið við orðum eftir Hans Jákupi Glerfoss, sum fyrst og fremst var kendur sum listamálari, men sum eisini var gávaður yrkjari.

Í yrkingasavninum Kvirra í reyðum og bláum frá 1969 stendur yrkingin Tagna ikki.

Tagna ikki tunga,
kámast ikki sjón –
ævinliga unga,
ver mín altíð, vón.

Lýs á hvørjum degi
sálardýpið sum
sól í síni megi
jarðarkringin um.

Kveik so hvørt sum kølna
kertur, aftur fleir –
lív, so hvørt sum følnar
sterkari og meir.

Hjartans tøkk fyri í kvøld øll somul.

**Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum**